# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Føroya Fróðskaparfelag:

# Elin Súsanna og Marjun fingu sømdargávur



*Elin Súsonna Jacobsen, søgufrøðingur og Ph.D. í søgu, og Malan Marnersdóttir, dr.phil. og professari á Fróðskaparsetrinum*



*Malan Marnersdóttir og Marjun Arge Simonsen, cand.phil. í norðurlendskum, serstakliga føroyskum máli og bókmentum*

**Mánadagin 16. oktober skipaði Fróðskaparfelag Føroya fyri eini almennari mentanarløtu í Listaskálanum, í sambandi við at tvær sømdargávur vórðu handaðar úr Grunni Kristjans á Brekkumørk**

MENTANARLØTA
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Mentanarløtan byrjaði við at Lis E. Mortensen, formaður í Fróðskaparfelagnum, beyð vælkomin og segði nøkur orð. Eftir at tey fýra frá kórinum Tarira høvdu sungið, helt Carl Jóhan Jensen, rithøvundur, ein áhugaverdan fyrilestur um Chr. Matras sum ummælara.

Síðan segði Malan Marnersdóttir, dr.phil. og professari á Fróðskaparsetrinum nøkur orð og handaði Elin Súsonnu Jacobsen og Marjun Arge Simonsen sømdargávurnar og grundgav fyri, hví tær fingu hesar gávurnar.

Elin Súsanna Jacobsen er søgufrøðingur og Ph.D. í søgu og arbeiðir sum lektari á Søgu- samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya. Hon fekk sømdargávnuna fyri sítt slóðbrótandi virki fyri føroyskum vísindamáli, og fyri at hon hevur víst, at tað ber til at skriva unga vísindamál okkara við løttum penni. Eisini fekk hon sømdargávuna fyri sínar væleydnaðu týðingar við livandi ansni fyri málinum.

Marjun Arge Simonsen er cand.phil. í norðurlendskum, serstakliga føroyskum máli og bókmentum. Hon hevur egið virki „Orðafragd", har hon m.a. rættlesur, týður og evnar til frøðiorðalistar. Eisini skipar hon fyri skeiðum í føroyskum fyri útlendingar og hevur skeið í rættskriving. Marjun fekk sømdargávuna fyri slóðbrótandi arbeiði sítt fyri náttúruvíndaligum máli.

Báðar fingu tær 20.000 kr. í part frá grunninum.

### Grunnur Kristjan á Brekkumørk

Grunnur Kristjan á Brekkumørk varð stovnaður av Chr. Matras, professara, dr. phil., og Føroya Fróðskaparfelag. Stovnsfæið stavar frá OSSIAN-heiðursløninni, sum Die Stiftung F.V.S. zu Hamburg, veitti Christiani Matras og Fróðskaparfelagnum í 1981. Endamál grunsins er at styðja einstaklingsvirki føroyskum máli at frama. Hetta verður gjørt við sømdarpeningi, ið verður tikin av rentuinntøkunum.

Tey sum áður hava fingið sømdargávu úr grunninum eru: Jóhannes av Skarði, Hans Thomsen, Hanus Debes Joensen, Hanus Kamban, Jonhard Mikkelsen, Axel Tórgarð, Jóhan Hendrik W. Poulsen, Jeffrei Henriksen og Ingrid Sondum.

Nevnd Fróðskaparfelags ger av, hvussu ofta sømdarpeningur verður veittur, og hvussu nógv hvørja ferð. Tað ber ikki til at søkja um sømdarpening. Til at finna gávuevni hevur Føroya Fróðskaparfelag manna eina kjørnevnd við Erlandi Viberg Joensen, ph.d. og leiðara á Tórshavnar Býarsavn, Onnu Mariu Fosaa, ph.d. og deildarleiðara á Náttúrugripasavninum og Maluni Marnersdóttur, dr.phil. og professara á Fróðskaparsetrinum.



*Carl Jóhan Jensen, rithøvundur, heldur fyrilestur um Chr. Matras*



*Fýra fólk úr kórinum Tarira sungu undir móttøkuni*

Bárður Nielsen og Terji Solberg Johansen:

## Sveinaroynd við IT Skolen í Vejle



*Aftara rað f.v.: Niels-Peder Møller, Vejle, lærari, Dennis Halling Andersen, Næstved (Hansen & Nielsen), Bárður Nielsen, Skopun, (El & Tele).*
*Fremra rað f.v.: Kjeld Kielsgaard, Skive (Steen K. Pedersen A/S), Terji Solberg Johansen, Tórshavn (El & Tele)*

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 13. oktober 2006 stóðu fýra næmingar á IT Skolen í Vejle sveinaroynd innan »kommunikation- og sikringsteknik«, sum fakið eitur á donskum . Av hesum vóru tveir føroyingar: Bárður Nielsen úr Skopun og Terji Solberg Johansen úr Havn, sum báðir eru í læru hjá P/F El & Tele á Argjum.

»Kommunikation- og sikringsteknik« er elektrikaraútbúgving við einum yvirbygningi, har dentur er lagur á at læra um teledata- og trygdar- loysnir.

Bárður og Terji verða útlærdir í mars 2007.